# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Jógvani Adolfi Johannesen fyrrverandi tingmanni til minnis



Vit í Føroya Javnaðarflokki drýpa høvur, nú Jógvan Adolf Johannesen, fyrrverandi løgtingsmaður ikki longur er okkara millum. 70 ára gamalur hevur hann nú lagt árarnar inn, men hóast hann ikki náddi kappaaldur, so náddi Jógvan Adolf so ómetaliga nógv í sínum lívi.

Jógvan Adolf vaks upp í Putlhúsi í Dali - í einum heimi, har hendurnar vóru álitið. Í hesum húsum sá hann fyrstu ferð dagsins ljós, og í hesum somu húsum legði hann eyguni aftur fyri seinastu ferð.

Sum ungur var hann til sjós í nøkur ár, men eftir at hava nomið sær læraraútbúgving, sat hann í mong Harrans ár aftan fyri pultin og lærdi uppvaksandi ættarliðið. Men hetta var ikki nóg mikið fyri Jógvan Adolf. Hann átók sær skrivarastarvið hjá kommununi í Skopun, har hann búði og starvaðist tey mongu árini. Hann var við í flakavirkisvinnuni, og hann var reiðari og saman við øðrum eigari av fleiri skipum, sum høvdu og enn hava alstóran týdning fyri vinnulív og trivnaðin í hansara heimaoyggj. Men tað var sum løgtingsmaður, at vit í Javnaðarflokkinum fyrst og fremst komu at kenna hann. Hetta starv røkti hann frá 1988 til 98.

Løgtingsvalið 1990 var minniligt fyri okkum, tá Javnaðarflokkin kom á ting við ikki færri enn 10 løgtingsumboðum. Eg var nývaldur, og tí varð stigið varisliga, tí her vóru kvinnur og menn, sum vóru gomul í garði og høvdu verið í mongum politiskum leiki. Jógvan Adolf var tá afturvaldur. Vit komu soleiðis at arbeiða saman í politikki í átta ár.

Beinanvegin legði ein til merkis henda mannin við tí drynjandi og syngjandi sandoyarmálinum. Hann var støðufastur sum fáur og ikki altíð tann lættasti at gera semjur við. Hansara politiska kjølfesti var trygt, og løturnar, tá hann greiddi frá, hví hann gjørdist júst javnaðarmaður, vóru kveikjandi og hugtakandi. Jógvan Adolf hevði eitt sera lætt sinni, og mangan kundi hann fáa láturin á Gamla Apoteki at runga.

Vit høvdu ikki sitið leingi í samgongu, tá búskaparligu óløgini skolaðu inn yvir okkum. Jógvan Adolf, sum jú var virkin í vinnuni, visti betur enn nakar, hvussu støðan var úti um landið. Henda kreppan tók okkum øll sera fast, men serliga fast tók hon Jógvani Adolfi, sum sat við øllum trupulleikunum í føvninginum.

Eitt lemjandi arbeiðsloysi rakti landið, men ongastaðni so fast sum í Sandoynni, har ikki ein króna var at vinna fyri tær mongu arbeiðsleysu hendurnar. Men Jógvan stakk ikki upp fyri nøkrum, men bardust sum úlvur á skóg fyri at finna veg út úr vónleysu støðuni. Sjálvt um »Sandoyarloysnin«, sum fekk gongd í aftur í oynni, var ein politisk loysn, sum samgongan og Løgtingið framdi, so var tað Jógvan Adolf, sum trýsti mest á. Henda tíðin fyrst í 90´unum var sanniliga ikki nakar dansur á rósum, og tað leikaði mangan hart á. Hetta merkti okkum øll, men serliga merkti tíðin tingmannin í Sandoynni.

Jógvan átti ikki hetta at fella í fátt. So mikið gott hevði hann fingið í beinini í Dali, at hann visti, at einki kemur av sær sjálvum, men at stríð og áhaldni skal til. Tað vóru knotur í honum. Og kom eitt bakkast, sum tá Klettarnir fóru, so herjaði hann á aftur og keypti saman við øðrum Eysturbúgvan.

Jógvan Adolf var søgukønur sum fáur, og ikki minst dugdi hann okkara egnu søgu. Fyri ikki at tosa um kvæðini og føroyska dansin, sum stóðu hjarta hansara serliga nær. Tað var sannur hátíðardámur yvir honum, sum var hann komin inn í ein halgidóm, tá hann í føroyskum klæðum fór uppá gólv og tráddi dansin so lystiliga. Tí var tað eisini skiljandi at mentamálini høvdu hansara serliga áhuga.

Jógvan Adolf var ein framúr góður røðari. Við nærlagni fyrireikaði hann seg og skrivaði røðuna við vøkru handskrift síni, og so tók hann orðið. Føroyska málið fall honum so leikandi lætt, og neyvan man føroyskt hava verið framborið meira virðiligt, enn tá Jógvan Adolf bar tað fram á tingi.

Nú er henda eyðkenda rødd tagna. Vit í Føroya Javnaðarflokki eru sera takksom fyri tað arbeiðið, hann útinti í politiska starvi sínum og lýsa frið yvir minni um partamannin og vinmannin Jógvan Adolf Johannesen.

**Jóannes Eidesgaard**
**floksformaður**



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

## Hans Jørgen Jensen deyður

Hans Jørgen Jensen, fyrrverandi fólkatingsmaður, andaðist fyrr í mánaðinum, 77 ára gamal. Hans Jørgen Jensen, sum búði í Nærum við Keypmannahavn, var fólkatingsmaður frá 1977-84 og frá 1987-94. Hann var eisini kendur í Føroyum, tí á hvørjum ári í fleiri ár var hann umboðsmaður fyri fólkatingið til aðalfundin hjá Færøernes Realkredittinstitut – vanliga nevnt Realurin. Hann var ein sannur føroyavinur, og honum dámdi avbera væl túrarnar í Føroyum.

Hans Jørgen Jensen hevði eisini sera stóran áhuga fyri fjølmiðlum og blaðarbeiði – og hann hevði eisini serligan tokka til Sosialin og gjørdist ein »vinur av húsinum«, sum vit plaga at siga, tí hann vitjaði javnan á Sosialinum á sínum mongum føroyaferðum.



Hans Jørgen Jensen var fakfelagsmaður, hann var formaður í Funktionærforbundet frá 1977 – 1992, og hann var skrivari í sama felag frá 1970. Upprunaliga var hann útbúgvin í Trørød Brugsforening. Í 1951 var hann sjúkrakassafunktionerur, og í 1966 byrjaði hansara fakliga karriera, tá hann tók yvir sessin sum forrætningsførari fyri Sjúkrakassafunktionerarnar.

Hans Jørgen gjørdist tíðliga politiskt virkin, og var hann formaður í lokala DSU felagnum (ungmannafelagið hjá danska Javnaðarflokkinum) í Søllerød. Hann hevur eisini verið virkin í ymsum felagsskapum. Eitt nú var hann formaður í Sygekassernes Helsefond, hann var formaður fyri Den Nordiske Funktionærsammenslutning og gjørdi eisini stórt arbeiði fyri AOF (Arbejdernes Oplysnings Forbund).

Hans Jørgen Jensen var eisini fráhaldsmaður og virkin í fráhaldsrørsluni IOGT, sum hann eisini gjørdi stórt arbeiði fyri.

Eftir pensjónsaldur var hann í fleiri ár formaður í LO Faglige Seniorer, og síðstu tíðina var hann virkin í felagnum Fred og Forsonin-Mandela Center Danmark.

Í februar í fjør gav hann út bókina »På eget ansvar - En historie om manglende sammenhæng i sundhedsvæsenet« sum snýr seg um tað stríð hann fekk, tá konan gjørdist álvarsliga lungasjúk, og hann mátti vera um hana tey síðstu árini. Í bókini vísir hann vantandi virðingina, sum heilsuverkið gevur fólki í slíkari støðu.